Føroya Pedagogfelag Semja Sáttmálasettir pedagogar og hjálparfólk 2003
Galdandi frá 1. oktober 2003

**1. Sáttmálaskeið**

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2003 til 1. oktober í 2005.

Semjan byggir á ein karm, sum er umleið 9 %.

**2. Løn**

Lønin hækkar soleiðis:

3,05 % 1. oktober í 2003

3,1 % 1. oktober í 2004.

**3. Eftirløn**

Eftirlønin hjá hjálparfólkum verður 9 % frá 1. oktober í 2003.

Eftirlønin hjá hjálparfólkum verður 10 % frá 1. oktober í 2004.

**4. Broytingar í lønarstiganum**

**Bústovnaøkið**

- Hjá hjálparfólkum verður eitt stig lagt afturat endalønini. Tey hjálparfólk, sum hava staðið á 7. stigi í 2 ár, verða flutt á 8. stig.
- Hjá pedagogum verða tvey stig løgd aftur at endalønini. Teir sáttmálasettu pedagogar, sum hava staðið á 16. stigi millum 2 og 4 ár, verða fluttir á 17. stig og teir sum hava staðið á 16. stigi í meiri enn 4 ár, verða fluttir á 18. stig.
- Leiðarar og varaleiðarar verða fluttir 2 stig.
- Deilarleiðari á Føroya Barnaheimi gongur stigini 20, 22, 24 og 26.

**Dagstovnaøkið**

- Hjá pedagogum verður lægsta stigið strikað og 2 stig verða løgd aftur at endalønini Allir pedagogar verða fluttir 1 stig og teir pedagogar, sum hava staðið á 14. stigi í meiri enn 2 ár, verða fluttir á 16. stig.
- Hjá varaleiðarum og økispedagogum verður lægsta stigið strikað og 2 stig verða løgd aftur at endalønini. Varaleiðarar og økispedagogar verða fluttir 1 stig og teir, sum hava staðið á endastigi í meiri enn 2 ár, verða fluttir tvey stig.
- Leiðarar og dagrøktarleiðarar verða fluttir 2 stig.

**5. Felags sáttmáli fyri hjálparfólk og pedagogar**

Arbeiðsbólkur verður settur, sum í sáttmálaskeiðnum samanheldur báðar sáttmálarnar. Málið verður tikið upp aftur til næstu samráðingar. Í arbeiðsbólkinum eru tvey umboð fyri hvønn partin. Arbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagi 1. apríl í 2005.

**6. Arbeiðstíðarreglur**

Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag velja trý umboð í part at samráðast um arbeiðstíðarreglur, soleiðis at tær kunnu verða partur av sáttmálanum. Arbeiðið byrjar 1. apríl í 2004 og verður liðugt 1. oktober í 2004. Verður ikki semja, hava partarnir ikki rætt at lýsa verkfall ella verkbann. Ber avtalan í sær meirkostnað, fær hon gildi 1. oktober í 2005 og kostnaðurin verður tikin av karminum tá.

**7. Avtala um serstakar frídagar**

Ein upphædd, svarandi til 1% av lønarsumminum 1. oktober í 2003, verður nýtt til serligar frídagar. Sáttmálafrídagarnir fella burtur 1. januar í 2004, men nú kunnu starvsfólk vinna sær eina fríviku eyka. Innvinningin fer fram sum tá ið starvsfólk vinna sær frítíð eftir frítíðarlógini. Avtalan er liðilig, soleiðis at fólk, sum ikki vilja hava frídagarnar, í staðin kunnu fáa teir útgoldnar. Virðið á einum frídegi er tá 0,5% av einari ársløn.

**8. Endurskoða § 1**

Í sáttmálaskeiðnum endurskoða partarnir § 1 í sáttmálanum hjá sáttmálasettum pedagogum.

**9. Broytingar í sáttmálatekstinum hjá pedagogum og hjálparfólkum**

Orðingin í § 14, stk. 1 og 2 hjá pedagogum og § 20, stk. 1 og stk. 2 hjá hjálparfólkum verður broytt soleiðis:

Mánaðarlønt starvsfólk fær, í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina, setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

1. navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
2. nær setanin tekur við
3. galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir,
4. starvsheiti,
5. byrjanarløn (grundløn umframt fastar viðbøtur og/ella ískoyti),
6. eftirlønargjald,
7. starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
8. uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og setta,
9. setanarbrotpartur, arbeiðstíð,
10. frítíð við løn og frítíðarískoyti,

11. setanarøki og
12. arbeiðsstaður/staðir í løtuni (fatar arbeiðið um fleiri arbeiðsstaðir, skal verða viðmerkt á hvørjum arbeiðsstaði umsøkjarin hevur høvuðsstarv).

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum.

**10. Uppsiga sáttmálan**

Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. oktober 2003 og kunnu partarnir siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2005.

*26. oktober í 2003*

**Føroya Pedagogfelag** **Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya**

**Fíggjarmálaráðið**

Fíggjarmálaráðið - Kvíggjartún 1 - Postboks 203